# Leita eftir olju næsta ár

Norska oljufelagið Sagex Petroleum ætlar sær at fara undir at leita eftir olju í íslendskum sjóøki næsta summar. Felagið hevur fingið loyvi til at leita á einum øki á Drekaleiðini, sum er í landnyrðing úr Íslandi, og har ætlar felagið at gera seismiskar kanningar næsta summar, skrivar Vísir. Hinvegin er greitt, at Sagex Petroleum fer ikki at bora eftir olju uttan so, at onnur feløg koma upp í leitingina. Sagex Petroleum var tað einasta felagið, sum søkti um leitiloyvi á Drekaleiðini. Aker Exploration søkti eisini, men tók umsóknina aftur.



# Inntøkan minkað

Meiri enn triði hvør løntakari í Íslandi hevur mist burtur av inntøkuni, síðani bankarnir fóru av knóranum seinasta heyst. Ein kanning, sum Gallup hevur gjørt fyri fakliga landsfelagsskapin ASÍ, vísir, at 18 prosent fáa minni løn nú enn undan bankafallinum, 9 prosent hava mist burtur av arbeiðstíðini, og 8 prosent hava mist burtur av inntøkuni av øðrum skerjingum. Sostatt hava 35 prosent mist burtur av inntøkuni, og tað eru munandi fleiri enn í einari tilsvarandi kanning, sum bleiv gjørd í desember í fjør, skrivar Morgunblaðið.

# Grønland ov lítið til fullveldi

**Grønland verður ongantíð eitt sjálvstøðugt land, tí til tess er samfelagið alt ov fáment. Tað sigur ein bretskur búskaparprofessari, sum samanber Grønland við Ísland**

GRØNLAND
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Smá samfeløg sum tað grønlendska og tað íslendska eru alt ov viðkvom og hava ongar møguleikar at standa seg í altjóða búskaparmeldrinum.

So avgjørd er niðurstøðan hjá bretsku Anne Silbert, sum er professari í búskapi og starvast á lærda Birkbeck-háskúloanum í London. Hon veit helst, hvat hon tosar um, tí hon hevur tætt tilknýti til ta politisku nevndina í íslendska tjóðbankanum.



*-Grønland eigur at halda seg afturat Danmark, tí tað er tryggari, sigur Anne Sibert*
*Mynd: KNR*

Herfyri skrivaði Anne Sibert eina grein í samfelagsvísindaliga tíðarritinum Voxeu, og har skrivar hon millum annað, at verður Grønland sjálvstøðugt land, kann tað fara av knóranum á sama hátt sum Ísland. Spurd, um Grønland er ov lítið til fullveldi, er svar hennara greitt.

-Ja. Fólkatalið í Grønlandi er á leið ein fimtapartur av tí íslendska, og tí ber tað ikkii til at útvega tað fólk og tann føeleika, sum er neyðugur fyri at manna tær umsitingarligu eindirnar, sum eitt sjálvstøðugt land skal hava, sigur Anne Sibert við grønlendska kringvarpið KNR. Tað er ikki tann einasta forðingin, sigur hon, og vísir á, at fáment samfeløg eru eisini viðkvom á annan hátt.

## Trygd neyðug

- Ein annar trupulleiki er trygdin. Fær ein amerikanskur býur skaða í einari av teimum tropisku ódnunum, kann hann fáa hjálp frá statinum. Skuldi ein ódn gjørt stóran búskaparligan skaða í einum sjálvstøðugum Grønlandi, hava grønlendingar einki størri land at leita sær hjálp frá, sigur Anne Sibert við KNR.

Hon vísir á, at tess færri fólk búgva í einum landi, tess dýrari er tað fyri hvønn einstakan at reka samfelagið. Harafturat eru sveiggini í nýtslu og framleiðslu ofta størri í teimum smáu samfeløgunum enn teimun størru. Búskapurin hvílir á fáum vinnugreinum, og fáa tær trupulleikar, rakar tað samfelagið meint.

-Og so er tað eisini ein trupulleiki, at nógv bendir á, at í smáum samfeløgum og økjum hevur persónligt samband ofta stóra ávirkan á ta politisku skipanina, og tað elvir so til nepotismu og korrupsjón, sigur bretski búskaparprofessarin. Hon hevur bara eini ráð at geva grønlendingum:

- Grønland kann ikki vera ein sjálvstøðug tjóð, men eigur at halda fram saman við Danmark, tí tað tryggjar landinum eina vissa verju, sigur Anne Sibert at enda við grønlendska kringvarpið.

# Nýtt avgjald rakar ferðafólkini

**Atlantsflog, føroyskir myndugleikar og føroyskur fólkatingsmaður mótmæla nú, at avgjaldið hjá Atlantsflog at flúgva umvegis flogvøllin í Kastrup í Danmark hækkar við meira enn 450 prosentum frá 1. oktober at rokna**

FLÚGVING
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Flogvøllurin í Katrup hevur gjørt av, at flúgving til Føroyar og Grønland frameftir skal roknast sum uttanríkisflúgving. Higartil hevur hendan flúgving verið skrásett sum innanríkisflúgving.

Ein avleiðing av hesum er, at avgjaldið á flúgvingina hækkar munandi. Higartil hevur avgjaldið verið slakar 23 krónur, men frameftir skal tað vera meira enn 100 krónur fyri hvørt ferðafólk. Og hendan rokning verður send beinleiðis víðari til ferðafólkini.

- Vit halda, at tað er órímiligt, at hækkingin í avgjøldunum rakar okkum so nógv harðari enn onnur flogfeløg, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantsflogi.

## Málið reist í Fólkatinginum

Magni Arge hevur saman við stjóranum í Air Greenland sent Statens Luftfartsvæsen eitt skriv, har teir mótmæla hækkingini í avgjøldum.

Flogmyndugleikin er danskur, og sambært stjórunum báðum er øll flúgving í ríkisfelagsskapinum staðfest sum innanríkisflúgving í lóggávuni. Tí er einki grundarlag fyri at hækka avgjaldið á flúgvingina so nógv, siga flogfelagsstjórarnir í Føroyum og í Grønlandi.

Føroyskir myndugleikarnir hava mótmælt broytingini av Føroyaflúgvingini, og nú verður málið eisini reist í Fólkatinginum, har Høgni Hoydal, fólkatingsmaður, reisir málið mótvegis ráðharranum á økinum.

